gult cyan magenta svart



# Vóni tað fær undirtøku





*Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins heldur tað vera rætt og skilagott við almennum íkasti til nýggju Norrønu*

*Soleiðis fer at síggja út á eini av matstovunum umborð á nýggju Norrønu*

**Hóast landsstýrismaðurin í vinnumálum ikki heldur tað vera rættan politikk hjá landsstýrinum at seta nýggjan partapening í Smyril Line, so metir formaðurin í Javnaðarflokkinum tó, at tað skuldi verið góður møguleiki fyri at fingið eitt fleirtal av tingmonnum at atkvøða fyri uppskoti, sum er lagt fyri tingið**

TINGIÐ OG PARTAPENINGUR
*Jan Müller*

Í gjár legði Javnaðarflokkurin uppskot fyri tingið um at seta 25 mill. kr. í partapeningi í nýggju Norrønu, soleiðis at landið fastheldur sín eigarapart í Norrønu. Jóannes Eidesgaard, formaður sigur seg vóna, at uppskotið fer at fáa undirtøku. Hann heldur ikki, at samgonguflokkarnir hava læst seg fastar til ikki at vilja taka undir við uppskotinum, nú landsstýrismaðurin valdi at vísa umsóknini frá Smyril Line aftur.

Tað var eisini Javnaðarflokkurin í andstøðu, sum fyri fimtan árum síðani legði fram uppskot um at bjarga millumlandasiglingini, tí mett varð, at hon kundi verið eitt skilagott íkast til framtíðar ferðavinnu og búskapin annars. Eisini vað víst á mongu arbeiðsplássini, sum henda sigling bar í sær. Fólkaflokkurin, sum tá var í samgongu, tók undir við uppskotinum, meðan Sambandsflokkurin gekk ímóti.

Sosialurin skilur, at neyvan fara nógvir tingmenn at atkvøða ímóti uppskotinum.

# Avgerðin um útgerðarhavnina er tikin

ÚTGERÐARHAVN
*Jan Müller*

Í dag verður kunngjørt, hvat felag ella samtak fær uppgávuna at standa fyri útgerðarvirkseminum í sambandi við fyrstu oljuleiting við Føroyar. Hetta merkir eisini, at vit fáa at vita, um hetta virksemi verður út frá Havnini ella Runavík. Einki er likið út, so vit fáa heldur ikki komið við kvalitativum gitingum ella metingum. Men tað skilst, at bólkurin, sum hevur viðgjørt tey trý tilboðini, ikki hevur havt tað so trupult við at finna rætta samtakið, tí munur er á tilboðunum. Tey trý samtøkini, sum hava givið tilboð, eru Asco Føroyar við Tórshavnar Skipasmiðju og skotska útgerðarfelagnum Asco, síðani er tað Atlantic Supply Base í Runavík saman við Skipafelagnum og triðja samtakið er Eimskip saman við felag, sum rekur útgerðarvirksemi í ma. Hetlandi.

Hósdagin verður kunngjørt, hvør fær tyrluflúgvingina í sambandi við oljuleitingina. Her stendur valið millum Atlantsflog og Flogfelag Føroya, sum hava gjørt samstarvsavtalur við ávikavist Bristow Helicopters og Scotia.

# Ítróttahøllin ikki valstaður

**Í løtuni er ikki greitt, hvar havnarborgarar skulu atkvøða 26. mai. Ítróttahøllin á Hálsi er nevniliga ikki tøk hendan dagin**

*Turið Kjølbro*

Seinastu nógvu árini hevur ítróttahøllin á Hálsi verið leigað út til harmonikutiltakið Grannakarmur um løgtings- og kommunuvalið hjá borgarum í høvuðsstaðnum. Leygardagin 26. mai verður aftur val, hesa ferð fólkaatkvøða, men greitt er, at tey, ið ætla at gera av framtíðarstøðu Føroya henda dagin, ikki skulu í ítróttahøllina at atkvøða. Høllin er nevniliga henda dagin leigað út til harmonikutiltakið Grannastevna, og sum skilst á Paula Jacobsen, sum fyrireikar tiltakið, kann tiltakið ikki flytast.

– Vit bóðu um høllini seinasta vár og vit ganga út frá, at avtalan stendur við. Fólk koma úr Noregi, Íslandi, Svøríki, Hetlandi og møguliga eisini Grønlandi til tiltakið. Tiltakið er lagt í mai, tí tá er summarsiglingin hjá Norrønu byrjað. Vikuskiftið frammanundan 26. mai er høllin leigað út til annað endamál, og vikuskiftini eftir ber ikki til. So harmonikutiltakið verður 26. mai, sigur Pauli Jacobsen.

Tað er Tórshavnar býráð, sum umbiður ítróttahøllina á Hálsi til val. Hetta plagar vanliga at vera umleið ein mánað undan valdegnum. Tískil visti Tórgerð Hentze, sum tekur sær av hesum í býráðsumsitingini, ikki av, at høllin ikki er tøk valdagin.

– Hetta er ein heilt nýggj støða. Vit verða ivaleyst noydd at hyggja okkum eftir nýggjum hølum. Badmintonhøllin ella Gundadalshøllin eru tveir møguleikar. Ítróttahøllin á Hálsi er ógvuliga væl egnað til val. Tey, ið arbeiða á valstaðnum, fáa altíð eina máltíð á staðnum, og í høllini eru køkur og kantina, sigur Tórgerð Hentze.

Aulan í Kommunuskúlanum varð í nógv ár nýtt sum valstaður, men Tórgerð Hentze metir ikki, at hon kemur uppá tal aftur. Eitt stendur tó greitt.

– Vit blaka ongan út. Er ítróttahøllin leigað út til annað, virða vit tað.

gult cyan magenta svart



## FISKIVINNUTÍÐINDI



# Góðan fiskiskap eftir svartkjafti

SVARTKJAFTUR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Um hálgum trý tíðina í mánadagin fór nótabáturin Christian í Grótinum norður gjøgnum Nólsoyarfjørð fulllastaður av svartkjafti. Teir hava góð 2000 tons inni og tað er júst ein vika síðan, at teir løgdu av Klakksvík. Teir hava hendar túrin roynt vestan fyri Írland.

Krúnborg lá mánadagin á Fuglafirði og landaði millum 15-1600 tons av svartkjafti, sum teir hava fingið á somu leið sum Christian í Grótinum. Tróndur í Gøtu, sum er triðja føroyska skipið, ið roynir eftir svartkjafti í løtuni, er á fiskileið.

Av Havsbrún í Fuglafirði verður sagt, at føroysku bátarnir nú eru voðrnir so stórur, at tá fleiri landa til virkið, so er næstan ikki pláss fyri útlendskum skipum. Tó rokna teir við, at onkur íslendskur nótabátur fer at koma hendavegin við svartkjafti.

Í dag verður roynt eftir svartkjafti alt árið, men hendan tíðin er tó tann besta, eisini fyri úrtøkuna hjá Havsbrún. Svartkjaftur er eins og annar fiskur feitastur hesa tíðina av árinum.

## Nógv skip í Barentshavinum

Norsku fjølmiðlarnir skriva, at nógv skip royna í Barentshavinum í løtuni. Á Gráu leiðini royna einir 50 russiskir trolarar, men fiskiskapurin er smáligur. Vestanfyri er fiskurin størri.

Fleiri norsk skip eru farin í russiskan sjógv eftir lodnu. Við Norðkapp hava norskir línubátar góðan fiskiskap. Eisini eru nógvir russarar á leiðini við Norðkapp.

Føroysku trolararnir Sundaberg, Vesturvón og Enniberg royna eisini í Barentshavinum í løtuni.

**je**

## Kinverjar taka amerikanska toskamarknaðin

Tvífryst toskafløk úr Kina floyma inn yvir amerikanska fiskamarknaðin. Kina er nú vorðin triðstørsti útflytari av toskafløkum til USA og hevur skumpað Noreg niður á fjórða plássið.

Í 1999 flutti Ísland 42 prosent av teim toskafløkum, sum amerikanarar keyptu, Kanada 23 prosent, Noreg 13 prosent, Kina 10 prosent mog onnur lond 12 prosent. Í fjør sóu tølini soleiðis út: Parturin hjá Íslandi var 35 prosent, Kanada 23 prosent, Kina 19 prosent, Noregi 11 prosent og onnur lond 15 prosent.

Intrafish skrivar, at USA innflytir umleið 37.000 tons av toskafløkum hvørt ár. Tað er umleið at sum verður fiskað undir Føroyum eitt gott toskaár.

**je**

# Gólvsølan

**Stívliga 55 tons vórðu seld á gólvuppboðssøluni hjá Fiskamarknaðinum mánadagin. Í alt høvdu 118 bátar avreitt, og framgongur av yvirlitinum, hvussu stóra nøgd einstøku bátarnir avreiddu**

| Sýslunummar | Skipanavn | kilo |
|---|---|---|
| FD 18 | SIRIÐ | 168 |
| FD 79 | HAVØRNIN | 345 |
| FD 101 | STRANDINGUR | 213 |
| FD 124 | MÚLATINDUR | 155 |
| FD 136 | LILJA | 459 |
| FD 138 | BYRGI | 204 |
| FD 174 | SILVER BELLE | 164 |
| FD 176 | HELEN | 815 |
| FD 222 | GAMLI EDVARD | 727 |
| FD 235 | STREYMSTEINUR | 174 |
| FD 256 | AÐNASKER | 108 |
| FD 258 | TINNA | 72 |
| FD 306 | VESTURLAND M/S | 133 |
| FD 310 | SJÓBERIN | 81 |
| FD 329 | KARIN 3 | 415 |
| FD 361 | SÚLAN | 757 |
| FD 377 | JULIA | 173 |
| FD 380 | AMANDA | 85 |
| FD 390 | ELISABETH | 192 |
| FD 420 | REYNIR | 1.425 |
| FD 428 | MARGIT J | 195 |
| FD 437 | MUNKURIN 3 | 441 |
| FD 464 | SÆBORG | 57 |
| FD 571 | DURITA | 688 |
| FD 67 | HULDUSTEINUR | 253 |
| FD 753 | MARIA | 56 |
| FD 761 | GUNNVÁ | 286 |
| FD 780 | BAKKAFOSSUR | 671 |
| FD 783 | GLÚPUR | 1.153 |
| FD 795 | NORÐHEIM | 326 |
| FD 80 | NORÐBÚGVIN | 1.144 |
| FD 855 | LÓMUR M/B | 67 |
| FD 860 | SJÓGUTTIN | 1.133 |
| FD 884 | ÁLKAN | 102 |
| FD 905 | TRÚGVI | 1.176 |
| FD1019 | HEGRIN | 105 |
| FD1137 | RIVTANGI | 335 |
| FD1140 | EYÐIN | 603 |
| KG 106 | BARIÐ | 217 |
| KG 125 | BJARNABERG | 205 |
| KG 143 | KALLANES | 147 |
| KG 170 | ELJAN | 195 |
| KG 189 | VÁTIKLETTUR | 2.536 |
| KG 243 | GUDRUN | 1.107 |
| KG 244 | ÅGOT | 401 |
| KG 248 | SJÓSTEINUR | 163 |
| KG 279 | NORÐBERG | 3.598 |
| KG 334 | NORÐAN | 748 |
| KG 349 | POLARSTJØRNAN | 664 |
| KG 430 | BÁRAN | 1.597 |
| KG 45 | RANDI | 198 |
| KG 480 | HVÍTABRÚGV | 139 |
| KG 63 | POLLUR | 69 |
| KG 640 | HANSA | 292 |

| Sýslunummar | Skipanavn | kilo |
|---|---|---|
| KG 703 | HENNY | 641 |
| KG 708 | VÁRSÓL | 228 |
| KG 744 | OSLA | 3.348 |
| KG 888 | RANNVÁ | 142 |
| KG 92 | ØLDAN | 216 |
| SA 110 | NETJAN | 97 |
| TG 10 | EVI | 47 |
| TG 140 | JYTTE | 47 |
| TG 178 | MAJ | 295 |
| TG 26 | MAJBRITT | 65 |
| TG 330 | VÍKINGUR | 923 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | 980 |
| TG 471 | NÚPUR | 630 |
| TG 55 | BLÅABERG | 482 |
| TG 670 | VÍKABERG | 1.336 |
| TN 149 | ØRVUR | 262 |
| TN 164 | BORGARKLETTUR | 568 |
| TN 270 | TORGUN | 757 |
| TN 358 | VIÐARNES | 525 |
| TN 381 | SANCY | 400 |
| TN 390 | TRÝ SYSTKIN | 515 |
| TN 422 | NÓN | 240 |
| TN 561 | SAFIR 4 | 222 |
| TN 647 | SÍLIÐ | 86 |
| TN 753 | TÓRA | 2.431 |
| TN 81 | THOMMAS | 325 |
| TN 810 | GÓÐIDRANGUR | 529 |
| TN 892 | NØVAN | 507 |
| TN 897 | MAJ-N | 519 |
| TN 93 | KIRSTIN | 84 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | 220 |
| TN1090 | ANNIKA | 779 |
| TN1099 | LENA | 82 |
| VA 109 | ELLA | 143 |
| VA 111 | SIGGA | 287 |
| VA 125 | LÍRABERG | 606 |
| VA 132 | LÍV | 329 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | 272 |
| VA 202 | JENNY D | 59 |
| VA 213 | LEITISTANGI | 581 |
| VA 221 | CARINA | 156 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | 103 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | 90 |
| VA 287 | SÓLVÁ | 299 |
| VA 294 | NESTANGI | 208 |
| VA 324 | SKARVUR | 372 |
| VA 327 | FORTUNA M/B | 136 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | 166 |
| VA 350 | SIRIÐ | 344 |
| VA 352 | PETSY | 64 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | 706 |
| VA 717 | STÍGANES | 113 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | 132 |
| VA 82 | RAÐNES | 258 |
| VN 132 | TORDIS M/B | 218 |
| VN 136 | SÆVAR | 162 |
| VN 209 | LAKSURIN | 318 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | 463 |
| VN 255 | ELSA M/B | 518 |
| VN 309 | ATLANTA | 409 |
| VN 378 | TURIÐ | 137 |
| VN 408 | JÓNVØR | 317 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | 427 |
| VN 496 | REYNI | 298 |

## Meðalprísurin 14,58 krónur

LANDINGAR
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

11 skip seldu yvir telefonuppboðssøluna hjá Fiskamarknaði Føroya týsmorgunin. Meðalprísurin var lægri enn undanfarnu dagarnar, og hetta kemst millum annað av at rættuliga nógvurupsi var í millum. Av teimum 170 tonsunum, sum vóru seld yvir telefonina vóru 63 tons av upsa og hesin fór fyri kr. 5,17 fyri kiloið.

68 tons av toski vóru seld týsmorgunin og her var prísurin góður, kr. 22,55 fyri kiloið. Besta prísin fingu Skúgvur og Hansamaria, ávikavist kr. 23.20 og kr. 23,10 fyri kiloið